**9. flokkur**
**Venjingarskúlin**
**Tórshavn**

Ungdómstingið

**Ungdómstingmál nr. 2/2014: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan**

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan**

(teldur)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 67 frá 26. mai 2011, verður gjørd henda broyting:

§ 23, stk. 1 verður orðað soleiðis:

"Teir undirvísingarmiðlar, ið neyðugir eru, skulu ókeypis latast næmingunum til nýtslu. Hetta er tó ikki galdandi fyri tól og útbúnað, ið nýtt verða til undirvísing í frítíðini eftir § 4, stk. 6, og sum næmingarnir taka heim til egna nýtslu. Næmingar í framhaldsdeildini skulu fáa í boði at brúka teldu frá skúlanum í sambandi við verkætlanir, royndir, próvtøkur og líknandi. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um vavið av undirvísingarmiðlum sambært pkt. 1 og minstukrøv fyri teldur, sum verða brúktar til royndir sambært pkt. 3."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. august 2014.

**Viðmerkingar**
Í verandi støðu eru ikki nóg góðir karmar hjá næmingum at fara til royndir, próvtøkur o.líkn., tí at skúlin hevur ikki nóg nógvar teldur til næmingarnar. Tað er kostnaðarmikið

at  keypa teldu, og tí eru tað eisini fleiri, ið ikki hava pening til teldur. So við at seta hesa lóg í gildi fáa øll somu sømdir, av tí verður hetta eitt javnari samfelag.

Tað er neyðugt at lóggeva, tí vit vilja hava eitt javnari og betri samfelag. Hetta fer at hjálpa næmingum í allari framhaldsdeildini, og serliga teimum, ið eru fíggjarliga sperdir.

Tað er týdningarmikið, at felags reglur verða gjørdar, so at teldurnar koyra við sama ritbúnaði og lúka nøkur minstukrøv, so at næmingarnir verða settir eins.

Hetta fer at kosta nógv í fyrstu syftu, tá ið allar teldurnar skulu fíggjast. Men síðani verður tað bert umsitingin, ið fer at kosta. Vit meta, at hetta er ein góð íløga fyri samfelagið.

**Á Ungdómstingi, 10. februar 2014**

Hilbert Johannesen    Magnus Heinason Eysturoy    Jana Nielsen

Jasmin Mote    Barbara Gotved Petersen    Sólrún Thomsen

Jóhannus Suma Poulsen    Askur Skaalum Gregersen.